# Stjørnan má vinna á VB

**HONDBÓLTUR** Í oddastríðnum í Sunset-kappingini tekur Stjørnan sunnudagin ímóti VB, og hetta er ein dystur, ið má vinnast, fyri ikki at missa fyrimun mótvegis Tjaldri og Neistinum

Hilmar Jan Hansen

Kappingin millum trý tey fremstu liðini í kvinnuhondbóltinum er framvegis hørð, nú runt roknað fimm umfør eru eftir. Tjaldur og Stjørnan hava 30 stig og Neistin 28, so her kann framvegis alt henda.

Serliga avgerandi er tað hjá Stjørnuni at vinna sín dyst sunnudagin, tá VB vitjar í Klaksvík. Vágskvinnur hava argað dúgliga, og hóast tær fyri viku síðani taptu fyri Neistanum, er ikki vist, at tær ikki kunnu arga meira.

Tjaldur hevur frí um vikuskiftið, men Neistin hevur heimavøll ímóti VÍF, so helst koma tær bláu eisini upp á 30 stig. Triði dysturin er í morgin á Skála millum StÍF og Kyndil.

### KÍF kann nærkast

Mestsum alt kappingarárið hevur KÍF verið tað liðið, ið hevur ligið best fyri í kappingini um at sleppa at spæla FM-finalu ímóti Neistanum, ið mestsum má sigast at vera í einum klassa fyri seg.

Í kvøld hava kollfirðingar gyltan møguleika at styrkja sær um hesa støðu, tá teir spæla í Klaksvík ímóti botnliðnum, Team Klaksvík, tí sunnudagin skal triðfremsta liðið, VÍF, á útivølli spæla ímóti Neistanum.

KÍF eigur á pappírinum at vera stórfavorittur í Klaksvík, og Neistin er á heimavølli eisini favorittur ímóti VÍF. Tí skal vera løgið annað, um KÍF eftir hetta umfarið ikki er fimm stig framman fyri VÍF – og tá eru bara átta stig eftir at spæla um.

hilmarjan@sosialurin.fo




*Stjørnan og VB møtast sunnudagin í Klaksvík, og tá má Stjørnan vinna, fyri at halda Tjaldur og Neistan væl aftan fyri seg*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Mjølnir í finaluni

**KVINNUFLOGBÓLTUR** Við 3-0 sigri á KÍF mikukvøldið tryggjaðu Mjølnir-kvinnurnar sær fulla vissu fyri finalusessi, tí tær í minsta lagi verða nummar tvey í Eikliguni. Úrslitini í fýra ymsum dystum skulu passa sum fótur í hosu, skal SÍ taka hin finalusessin frá Fleyr

Hilmar Jan Hansen

Tá Fleyr sunnudagin vann á Mjølni, gjørdu vit ta niðurstøðu, at Fleyr hevði tryggjað sær finalusess, meðan Mjølnir framvegis skuldi vinna ein dyst fyri at tryggja sær pláss í FM-finaluni. Tað gjørdi Mjølnir í fyrrakvøldið, tá tað á heimavølli eydnaðist at vinna ein greiðan 3-0 sigur á KÍF.

Hetta gjørdist ein dystur, ið ongantíð var spennandi, tí Mjølnir var væl og virðiliga betra liðið, hóast KÍF royndi sítt besta. Mjølnir vann 25-12 í fyrsta setti, og tey bæði seinnu settini, tá eykaspælararnir sluppu inn at royna seg, vann Mjølnir í báðum førum 25-12.

Sostatt kann Mjølnir ikki gerast minni enn nummar tvey, og tað røkkur til finalusessin. Og hóast SÍ í teoriini kann fara fram um Fleyr, so er tann møguleikin so mikroskopiskur og óhugsandi, at Fleyr longu hevur kannað sær bitan, samstundis sum eingin í Sørvági man trúgva, at tað kann henda.

### Teoretiskt...

Fleyr hevur 21 stig og SÍ 17, og bæði hava tveir dystir eftir, so teoretiskt kunnu bæði enda á 21 stigum. Men av tí at hetta altso framvegis er ein teoretiskur møguleiki – so lítil hann enn er – kunnu vit tað sama gjøgnumganga hann niðanfyri.

Skal SÍ altso megna tað ótrúliga og yvirhála Fleyr í evstu løtu, skulu úrslitini í fýra dystum passa soleiðis saman, at Fleyr skal tapa bæði 0-3 fyri Ternuni á heimavølli og TB á útivølli, samstundis sum SÍ í sínum báðum útidystum ímóti Drátti og Mjølni skal vinna annan 3-0 og hin minst 3-1 – og so er SÍ í finaluni.

Tapir Fleyr báðar 0-3 og SÍ vinnur báðar 3-1, stendur á jøvnum í stigum og settmuni, og tá eru tað eftir grein 11g í kappingarreglunum innanhýsis uppgerðirnar, ið eru avgerandi. Tá kemur Fleyr í finaluna, tí Fleyr hevur vunnið tvær ferðir á SÍ, sum bara eina ferð hevur vunnið á Fleyr.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Dystir um vikuskiftið

**Eikligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 12/03 | 14.30 | ÍF - TB |
| 13/03 | 15.00 | Fleyr - Ternan |
| 13/03 | 15.00 | Dráttur - SÍ |

**Eikligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 11/03 | 18.30 | Fleyr - TB |
| 12/03 | 12.00 | ÍF - TB |
| 12/03 | 15.00 | SÍ - Fleyr |

**Sunset-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 12/03 | 17.00 | StÍF - Kyndil |
| 13/03 | 14.30 | Neistin - VÍF |
| 13/03 | 15.00 | Stjørnan - VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 11/03 | 19.15 | Team Klaksvík - KÍF |
| 13/03 | 16.00 | StÍF - Kyndil |
| 13/03 | 16.00 | Neistin - VÍF |

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 20 | 17 | 3 | 55 | 14 | 41 | 22 |
| 2 | Fleyr | 19 | 16 | 3 | 51 | 19 | 32 | 21 |
| 3 | SÍ | 19 | 14 | 5 | 46 | 24 | 22 | 17 |
| 5 | ÍF | 19 | 11 | 8 | 38 | 31 | 7 | 14 |
| 6 | TB | 19 | 8 | 11 | 31 | 41 | -10 | 9 |
| 6 | Ternan | 19 | 5 | 14 | 21 | 46 | -25 | 7 |
| 7 | KÍF | 20 | 4 | 16 | 17 | 54 | -37 | 5 |
| 8 | Dráttur | 19 | 2 | 17 | 23 | 53 | -30 | 3 |

## Eik-ligan *menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 19 | 17 | 2 | 53 | 15 | 38 | 24 |
| 2 | Mjølnir | 19 | 12 | 7 | 41 | 28 | 13 | 17 |
| 3 | SÍ | 18 | 10 | 8 | 40 | 27 | 13 | 12 |
| 4 | Fleyr | 18 | 7 | 11 | 25 | 39 | -14 | 9 |
| 5 | TB | 18 | 0 | 18 | 4 | 54 | -50 | 0 |

# Kvinnufótbóltur sum tema

**FÓTBÓLTUR** Í morgin skipar Fótbóltssambandið fyri fundi um kvinnufótbólt, hvussu fleiri gentur byrja at spæla fótbólt og hvussu fleiri kvinnur fáast at halda longri á sum spælarar

Hilmar Jan Hansen

Temadagurin um kvinnufótbólt byrjar longu við morgunmati klokkan 9.30, og klokkan 10 fer so sjálv fundarskráin í gongd. Fótbóltssambandið hevur mælt feløgunum til at senda trý umboð til fundin, og hava feløgini fingið at vitað, at hesi eiga at vera eitt nú nevndarlimir, ábyrgdarfólk, kvinnu- og gentuvenjarar, ið altso varða av kvinnufótbóltinum í einstaka felagnum.

Ætlanin við fundinum er at fáa sett størri fokus á kvinnufótbólt, at fáa fleiri gentur at spæla fótbólt og at fáa fleiri kvinnuligar spælarar at halda longri á í fótbólti. Ljós verður varpað á hesi evni á ymsan hátt gjøgnum dagin, ið byrjar við nøkrum sjónarmiðum um føroyskan kvinnufótbólt, ið tekniski stjórin, Petur Simonsen, og landsliðsvenjarin, Álvur Hansen, fara at leggja fram.

Serligur gestur á temadegnum er fyrrverandi svenski landsliðsspælarin, Susanne Erlandsson, sum er varaforseti í svenska fótbóltssambandinum, umframt at hon situr í fótbóltsnevndunum hjá bæði UEFA og FIFA. Hon hevur ein part av síni framløgu fyri døgurða, og aftaná heldur hon fram, tá høvi eisini er at gera viðmerkingar ella koma við spurningum.

Somuleiðis verða sjónarmið at hoyra frá Víkingi sum felag, Randi Wardum sum spælara og Bjørn Krog sum venjara, og dagurin endar annars við at taka samanum, hvørji málini eru, hvussu tey verða rokkin og hvør skal gera hvat.

hilmarjan@sosialurin.fo

## Sunset Deildin *Kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Tjaldur | 19 | 543 | 447 | 96 | 30 |
| 2 | Stjørnan | 18 | 514 | 421 | 93 | 30 |
| 3 | Neistin | 19 | 525 | 442 | 83 | 28 |
| 4 | VB | 19 | 481 | 474 | 7 | 20 |
| 5 | Kyndil | 19 | 438 | 464 | -26 | 14 |
| 6 | VÍF | 18 | 406 | 497 | -91 | 7 |
| 7 | StÍF | 18 | 351 | 513 | -162 | 1 |

## Atlantic Airways Deildin *Menn*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIN MÁL | TAPT MÁL | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Neistin | 19 | 669 | 515 | 154 | 37 |
| 2 | KÍF | 19 | 532 | 500 | 32 | 24 |
| 3 | VÍF | 19 | 528 | 489 | 39 | 21 |
| 4 | Kyndil | 19 | 488 | 495 | -7 | 19 |
| 5 | H71 | 19 | 519 | 507 | 12 | 18 |
| 6 | StÍF | 19 | 486 | 504 | -18 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 18 | 430 | 642 | -212 | 2 |